Fiskamarknaður Føroya á Toftum:

# Hevur fingið nýggja og framkomna skiljimaskinu

**Tað eru Noma Tek og Formula Fo, sum hava staðið fyri menningini av hesi framkomnu skiljimaskinu. Nýggja maskinan hevur nógv størri kapasitet, tekur minni pláss og krevur minni fólk enn hin maskinan, sum nú er farin til Vágs**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánamorgunin var ætlanin at royndarkoyra nýggju og framkomnu skiljimaskinuna, sum Noma Tek og Formula Fo hava bygt til Fiskamarknaðin Føroya á Toftum.

Oskar Joensen, sum starvast á uppboðssøluni, sigur, at nýggja maskinan er royndarkoyrd í smáum, og hann hevur góðar vónir um, at hon verður eitt stórt framstig hjá Fiskamarknaðinum.

– Men hetta er ein framkomin maskina, og tí slepst neyvan undan onkrum "barnasjúkum" í byrjanini. Her eru nógvar stýringar av ymiskum slagi. Men tá ið alt er komið uppá pláss, ivist eg ikki í, at maskinan kemur at lætta nógv um skiljingina.

Mánamorgunin lógu tvey línuskip, Váðasteinur og Morgunstjørnan, og landaðu, og ætlanin var, at nýggja maskinan skuldi skilja ein part av hesum fiskinum. Men tá ið Sosialurin frætti, var skiljingin við nýggju maskinuni ikki byrjað.



*Tað serliga við nýggju skiljimaskinuni hjá Fiskamarknaði Føroya er, at allur tann skildi fiskurin kemur út av endanum. Vanliga standa eini 10, 12 ella 14 kør við eina skiljimaskinu, og hesi "portur" taka nógv pláss.*

### Minni pláss

Oskar Joensen sigur, at ein trupulleiki hjá Fiskamarknaði Føroya er, at plássið er ikki so nógv, sum ynskiligt er, og tí er skiljimaskinan eisini lagað til verandi umstøður.

– Tað serliga við hesi maskinuni er, at allur tann skildi fiskurin kemur út av endanum. Vanliga standa eini 10, 12 ella 14 kør við eina skiljimaskinu, og hesi "portur" taka nógv pláss. Hendan maskinan er líka sum í tveimum. Hon skilir fiskin uppí kør, sum taka 300-400 kg., og tá ið tey eru full, verður fiskurin stoyttur niður á band, sum førir hann út av endanum. Har standa so tvey kør, sum taka ímóti tí skilda fiskinum.

Hann sigur, at nýggja maskinan kann skilja fiskin frá tveimum skipum í senni – ella t.d. fisk frá einum skipi á aðrari "linjuni" og útróðarfisk á hinari.

### Øktur kapasitetur

– Vit hava havt eina Scanvægt-skiljimaskinu, sum kundi skilja eini 10-12 tons um tíman - alt eftir, hvussu gekst. Haraftrat høvdu vit eina hondgjørda linju, sum FJM í Runavík hevur gjørt. Mett verður, at nýggja maskinan skilir eini 20-30 tons um tíman. So, hetta er ein stór kapasitetsøking.

Oskar sigur, at Fiskamarknaðurin hevur hugt seg væl um eftir eini nýggjari skiljimaskinu, sum hevur nøktandi kapasitet og ikki tekur ov nógv pláss. Nógvar maskinur hava verið inni í myndini. Niðurstøðan er, at maskinan, sum Noma Tek og Formula Fo hava ment, er besta loysnin, og hon er mest at kalla skræddaraseymað til okkum.

– Hetta er tann fyrsta av sínum slag í Føroyum, leggur hann aftrat.

### Eitt framstig

Scanvægt-maskinan er flutt suður til Vágs á uppboðssøluna, sum Fiskamarknaður Føroya hevur har suðuri.

Oskar sigur, at meðan eini 6 fólk áður stóðu við gomlu skiljimaskinuna og skiltu 10-12 tons um tíman, kunnu nú eini 4 fólk skilja 20-30 tons um tíman við nýggju maskinuni, tá ið hon er komin í gongd.

– Hetta skuldi avgjørt verið eitt framstig hjá okkum, sigur Oskar Joensen at enda.

Stjóri á Fiskamarknaði Føroya er John Nielsen.




# Illveðrið tarnar fiskiskapinum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað hevur viðrað illa seinastu dagarnar, og mánamorgunin vóru fleiri avlýsingar fyri veður og kava. Nøkur skip hjá Strandferðsluni lógu, og nakrir leiðir koyrdu ikki. Skúlar í Suðuroy lýstu við, at eingin skúlagongd var, og tað gjørdi Sandoyar Meginskúli eisini. Koyrandi var ikki til eysturbygdirnar í Sandoynni, ikki á vestmannavegnum og heldur ikki var koyrandi til Gjáar. Skálafjarðasiglingin varð eisini rakt av vánaligu líkindunum.

### Lítil fiskiskapur

Men tað er ikki bara uppi á landi, at illveðrið ger um seg. Tað ger tað, sum rímiligt er, eisini á sjónum.

Lítil fiskur var á marknaðinum mánamorgunin og tey skip, sum vóru komin inn, høvdu lítið av fiski. Tískil var líkt til, at gólvini á nøkrum flakavirkjum verða turr í dag ella í morgin. So, tá fáa nøkur fólk, sum starvast á hesum virkjum, ivaleyst eina fríløtu við hús.

Skansatangi og Research lógu landingarklárir í Saltangará mánamorgunin; teir høvdu bert 700-800 kassar tilsamans. Av hesum vóru 40.000 pund upsi. Restin toskur, hýsa og onnur fiskasløg.

Á Fiskavirking í Saltangará væntaðu tey Vesturvarða mánakvøldið. Teir hava einar 1000 kassar, harav sløk 80.000 pund er upsi.

- Vit vænta, at vánaliga veðrið seinastu dagarnar er høvuðsorsøkin til, at fiskiskapurin nú er lakari. Tað er illa roynandi hjá skipunum, og tað sæst so aftur í nøgdini, tá ið skipini landa.

### Onkur frídagur

Tá ið vit frættu mánamorgunin, hevði Fiskavirking í Saltangará stívliga 50.000 pund niðurfyri, og tað tekur ikki langa tíð hjá einum slíkum virki at arbeiða tann fiskin undan.

- So, vit kunnu vænta, at her verður ein steðgur, nú veðrið er so vánaligt, søgdu tey á virkinum.

Fiskavirking í Saltangará hevur annars keypt nakað av fiski í Sørvági, men mánamorgunin var ikki koyrandi á vestmannavegnum, so hendan fiskin høvdu tey ikki fingið í hús, tá ið vit frætti.

# Vænta Rankan í vikuni

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

**Tvøroyri:** Á Fiskavirking á Tvøroyri høvdu tey nóg mikið av fiski til báðar teir fyrstu dagarnar í vikuni, hóast eingin landing var í gjár og neyvan í dag heldur.

- Men vit vænta Rankan einaferð í vikuni. Nær, hann kemur, er ikki greitt. Vit fara eisini at keypa nakað av fiski á uppboðssøluni, segði virkisleiðarin, Bjarni Hansen, tá ið Sosialurin frætti mánamorgunin.

Hann visti annars at siga, at øll skipini eru úti, bæði trolararnir og garnaskipini.

- Men tað hevur viðrað illa í seinastuni, so ivasamt er, hvat er komið burtur úr hjá skipunum hesar seinastu dagarnar, sigur virkisleiðarin.



# Stórt trýst á Kirkjubøar Kommunu

**Kirkjubøar Kommuna hevur yvir 40 umsóknir um grundstykki. Seinni í ár verður nýggj byggiætlan klár, men bæði barnaansing og skúli skulu fylgja við**

KOMMUNUMÁL
*Áki Bertholdsen*

Tað er stórur áhugi fyri at fáa grundstykki til sethús í Kirkjubøar kommunu. Men borgarstjórin, Annfinn Brekkstein, sigur, at bygdaráðið ætlar at fara varisliga fram, fyri ikki at missa tamarhaldið á støðuni.

– Tað er ikki bara at lata fólki grundstykki, sigur hann. Tað er so nógv annað, sum fylgir í kjalarvørrinum á tí, bæði skúli og dagrøkt og vit ætla ikki at fara skjótari fram, enn at vit kunnu fylgja við á teimum báðum økjunum eisini.

Á bygdaráðsfundinum, sum skuldi vera í gjárkvøldið, skuldi bygdaráðið hava fýra byggimál í samband við sethús á skránni. Talan er um tvey byggiloyvi á Velbastað og eitt byggiloyvi og eitt útgravingarloyvi í Kirkjubø.

Annfinn Brekkstein sigur, at kommunan veksur sera skjótt og kommunan hevur yvir 40 umsóknir liggjandi frá fólki, sum vilja hava grundstykki.

Hvussu nógvar av hesum umsóknunum er veruligar, veit hann ikki.

– Tað er sera stórt trýst á Suðurstreym sum heild og eg veit, at summi av teimum, sum hava søkt um grundstykki hjá okkum, hava søkt fleiri staðni í øllum miðstaðarøkinum, líka úr Havn, norður til Hósvíkar, og kanska longri við.

Fyrr var tað ein treyt fyri at fáa grundstykki í Kirkjubø ella á Valbastað, at fólk skuldi hava tilknýti til plássið, men tann treytin er burtur nú.

– Tað er ógvuliga positivt at fáa tilflytarar í kommununa. Tilflytararnir hava avgjørt verið eitt positivt íkast til kommununa, tí tað eru blivnar heilt aðrar bygdir.

Men hann sigur kortini, at tað framvegis er so, at fólk, sum hava tilknýti til kommununa, verða enn tikin framum, sigur hann.

### Ongi grundstykki

Annars er kommunan illa fyri við grundstykkjum, so nú eru ongistykki tøk. men kommunan arbeiðir við einum nýggjari byggiætlan og í henni eru útvið 40 grundstykki. Nýggja byggiætlanin verður klár seinni í ár.

– Men hesi stykkini verða ikki seld beinanvegin, tí vit ætla ikki at selja tey, fyrrenn vit hava barnaansing og skúlaviðurskiftini í lagi eisini til at taka ímóti teimum børnum, sum nýggja búsetingin førir við sær.

– Nú búgva 226 fólk í kommununi og av teimum eru 87 undir 18 ár, so her eru nógv børn. Nýggjur skúli er á Velbastað, men har eru næstan 40 børn longu. Skúlin tekur ikki stórt meiri enn eini 10 børn afturat, so er hann fullur og bíðilisti er til barnagarðin.

Men hann viðgongur eisini, at tað er mark fyri, hvat ein lítil kommuna orkar av útbyggingum og hann væntar ikki, at talan verður um nakra útbygging av týdningi tey næstu fimm árini.



*– Tað er gravgangur eftir grundstykki í Kirkjubø og á Velbastað, men kommununan ætlar at fara varisliga fram fyri ikki at missa tamarhaldið á støðuni*

# SEV brúkt milliónir uppá at kanna aðrar orkukeldur

ORKUVEITING
*Áki Bertholdsen*

– SEV hevur ikki ligið sjóvarfallið av sær. Tvørturímóti hava vit brúkt milliónir uppá at kanna øðrvísi orkukeldur enn tær, vit nú hava.

Hans Tausen Olsen er formaður í Umboðsnevndini hjá SEV og hann er alt annað enn samdur við Kára Thomsen, formanni í Føroya Nattúru og Umhvørvisverndarfelag, sum seinastu tíðina fleiri ferðir hevur funnist at SEV fyri at hava start seg blint uppá vatnorku og oljuverkum, heldur enn at kanna aðrar orkukeldur, sum fara betri við umhvørvinum.

### Kannað fyri milliónir

Hans Tausen Olsen sigur, at øll hesi seinastu nógvu árini hevur Sev brúkt einar 600-700.000 krónur um árið til at kanna øðrvísi orkukeldur við, bæði vindorku, brint,vatn og aðrar orku við.

Harumframt hevur Sev verkfrøðingar við útbúgvingum á økinum og onnur fólk í starvi, sum alla tíðina fylgja við og hava fingurin á pulsinum.

– Og niðurstøðan er, at í hvussu so er enn, liggja bæði brint, vindorka av týdningi og aðrar orkukeldur so langt frammi ítíðini, at tað hevði verið ómøguligt hjá Sev at lagt seg eftir tí.

– Uppgávan hjá Sev er at hava eina orkuveiting, sum altíð er 100% álítandi, tí tað ber ikki til, at vinnulív liggur við ongum streymi ella atspenningurin er ójavnur. Tí er tann heilt greiða niðurstøðan enn tann, at tað skilabesta í Føroyum er at seta álitið á vatnorkuna og motorkrafverkini.

### Vildu ikki levera

Formaðurin í umboðsráðnum førir fram, at tað eru ikki meiri enn tvey ár síðani, at Sev gjørdi avtalu við danska fyritøku um at levera eina vindmyllu.

– Men tá ið tað kom til stykkis, vildi fyritøkan ikki lata okkum fáa mylluna, tí teir stúrdu fyri, at hon fór ikki at at klára føroyska veðurlagið og at teir tí fóru at koma sær í ringt orð.

Hans Tausen Olsen vísir eisini á, at vindmyllurnar eru so stórar og tungar, at tað er neyðugt at hava vegasamband til myllurnar fyri at seta tær upp.

– Í føroyum hava vit ongi amboð at seta eina slíka myllu upp við.Táið vit skuldu fáa mylluna fyri tveimum árum síðani, var bara ein krani í øllum ríkinum, sum orkaði at lyfta eina myllu so høgt upp sum kravdust og tá var avtala gjørd um at fáa hendan kranan til Føroyar.

– At at tosa um at seta myllur upp í Fugloy og á Borðuni í Nólsoy, ella aðrastaðni, har ongin vegur er, er ikki sakligt, sigur Hans Tausen Olsen.

Hann leggur afturat, at netið hjá Sev tolir ikki meiri enn seks megawatt, so skulu vit hava vindorku, sum krevur, at nógv meiri skal leggjast út á netið, skal tað byggjast rættiliga nógv út.

– Alt hetta kostar óhugnaligar upphæddir og tí er vindorka av týdningi ikki upp á tal í løtuni.

Hann sigur eisini, at tað er veruleikafjart at tosa um aðrar orkukeldur sum nakað álítandi, tí hóast royndir verða gjørdar við brinti og øðrum, er hetta orkukeldur, sum liggja langt, langtframmi í tíðini.

Hann sigur eisini, at tað er ein spurningr um, antin vit eru sinnað til at avtakla ein stóran part av landslagnum við vindmyllum, tí vakrar eru tær ikki. og tað er eisini at skemma natúruna.

Hinvegin heldur hann ikki, at Vatnorkan hevur nakra serliga ávirka á umhvørvið.

– Tað er rætt, at vatn verður tikið úr áunum. Men eru tær ov turrar? Tað, eg havi fingið at vita frá teimum, sum fáast við seyð, er at har Sev hevur vatnorku, eru hagarnir er blivnir nógv betri, tí teir eru blivnir turrari.

– Tað doyggja nøkur síl á vegnum, men spurningurin er, um tað er ov høgur prísur at gjalda fyri at fáa vatnorkuna, sum annars er púra rein og óskaðilig fyri umhvørvið, sigur Hans Tausen Olsen.

Hann vísir eisini á, at flest øll onnur lond av fleiri møguleikar at útvega sær streym.

– Um so øll verkini í Danmark steðga, kunnu tey altíð fáa streym aðrastaðni frá. Tann møguleikan hava vit ikki í Føroyum. Vit hava bara tann streymin, vit sjálvi útvega okkum, tí má talan verða um heilt álítandi streym. Vit hava ikki ráð at trilva okkum fram við skipanum, sum enn eru meiri ella minni á royndarstigi, sigur Hans Tausen Olsen.



*Sev skal tryggja øllum landinum álítandi streym og tí ber ikki til at seta álitið á orkukeldur, sum enn eru meiri ella minni á royndarstigi. Heldur ikki vindorkan er nógv væl útbygt til at vera ein álítandi orkukelda enn, sigur Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini hjá Sev*

# Sev er mest demokratiski felagsskapurin í landinum

**– Tað er ongin felagsskapur í landinum so opin og demokratiskur sum SEV, sigur formaðurin í umboðsnevndini, Hans Tausen Olsen**

SEV
*Áki Bertholdsen*

Sev ein opin felagskapur

Hans Tausen Olsen sigur, at Sev er ein tann mest demokratiski felagsskapur í landinum.

– Tað eru kommunurnar, sum eiga Sev og hvør einasta kommuna er umboðað í umboðsráðnum við einum umboðið fyri hvørji 1.000 fólk, so at ein kommuna við 15 fólkum hevur eitt umboð, ein kommuna við 1.100 fólkum hevur tvey umboð og ein kommuna við 2.100 fólkum hevur trý umboð o.s.fr.

Umboðsráðið er hægsta vald í Sev og hava rætt at leggja mál fram til viðgerðar. Umboðsnevndin velur eitt stýrið, sum stendur fyri dagliga rakstrinum saman við stjóranum, undir ábyrgd fyri umboðsráðnum. Umboðsráðið velur eisini ein formann, sum er við á øllum fundum í stýrinum og annars er við í øllum, sum fer fram í Sev.

– Tað er eisini umboðsnevndin, sum góðkennir fíggjar- og rakstraætlanirnar hjá Sev.

Hans Tausen Olsen sigur, at tí er umboðsráðið fult út kunnað um alt, sum fer fram í Sev.

Hann sigur, at bæði Tryggingin og Føroya Sparikassi eru síðani farin yvir til somu skipan sum Sev við stýri og umboðsnevnd fyri at fremja opinleikan í stovnunum.

Fyri at gera Sev enn meiri opið, hevur leiðslan einaferð um árið ferðast út í hvørt økið í landinum at kunna umboðsmenninar um tær kanningar og verkætlanir, sum eru frammi, so at teir fáa høvi at spyrja og at koma við viðmerkingum.

Harafturat er ein skúlastova í umsitingarhúsinum hjá Sev í Havn, har skúlaflokkar, og onnur, kunnu koma at fáa upplýsingar um Sev.

### Fyri afturlætnum hurðum

HansTausen Olsen sigur, at higartil er tað støðan hjá umboðsnevndini hvat tað støðu, at fundirnir í umboðsnevndini hjá Sev skulu vera fyri afturlætnum hurðum.

– Hetta er eitt mál, sum umboðsnevndin sjálv avgerð.

Hans Tausen Olsen sigur, at fyri seks árum síðani varð uppskotframmi um at fundirnir skuldu vera almennir, men tað var greiður meiriluti ímóti tí.

– Meirilutin av umboðsnevndini helt, at Sev var so opin og demokratiskur felagsskapur frammanundan við tað, at allar kommunur hava umboð. Sami meiriluti helt, at verða fundirnir almennir, er eisini vandi fyri, at limir í umboðsnevndini fara at aftra seg við at føra síni sjónarmið fram.

Men nú er so aftur uppskot lagt fram um at fundirnir skulu vera almennir og tað kemur til viðgerðar á næsta fundi í nevndini.